Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hervør Pálsdóttir, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Navnalógin og tulkingarrættur

Spurningar:

1. Hvør landsstýrismaður hevur rætt at tulka navnalógina?
2. Heldur løgmaður, at tað gongur ímóti vilja Løgtingsins, um landsstýrismaðurin í mentamálum ikki gevur fólkakirkjuni boð um at skráseta børn saman við sammøðrum í kirkjubókina?
3. Ætlar løgmaður at bera so í bandi, at hesin trupulleikin verður loystur?

Viðmerkingar:
Í fyrispurningi (52-002/2022) frá undirritaðu svarar Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum, at tað er ikki neyðugt at broyta navnalógina til tess at skráseta børn hjá sammøðrum við eftirnavni hjá sammøðrum. Í svarinum verður eisini sagt, at tað er landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, sum hevur rætt at tulka navnalógina.

Tó er komið fram í miðlunum, at Mentamálaraðið er ósamt í hesum og hevur ikki givið fólkakirkjuni boð um at loyva hesum skrásetingunum. Spurningurin er tí, um landsstýrismaðurin í mentamálum gongur í móti vilja Løgtingsins, sum hevur samtykt uppskotini um at innføra sammóðurskap, ið javnsetir sammøður við onnur foreldur.

Hesin fyrispurningurin verður settur fyri at fáa greiðu á, hvat løgmaður, ið leiðir landsstýrið, ætlar at gera við hesa fløkjuna, og um løgmaður er samdur við landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum um hansara rætt at tulka navnalógina.

Á Løgtingi, 29. august 2022

Hervør Pálsdóttir